# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fólkatingsvalið

So kom fólkatingsvalið í Danmark, og verður tað sum m,unnugt tann 13. november. Valið kemur ikki óvæntað sum snarljós frá heiðum himni. Bakstøðið fyri valinum er áhugavert. Her er ikki talan um, at parlamentariska støðið rillar ella, at stjórnin hevur rent seg fasta. Danska stjórnin hevur eitt rættiliga trygt parlamentariskt støði við danska fólkaflokkinum sum stuðulsflokki. Hóast hetta støðið hevur ekvt til nakrar trupulleikar serstaliga við tey konservativu, og hertil alt fram ein heilt nýggja flokk Ny Alliance, so er tað ikki hesi viðurskifti, ið hava gjørt, at forsætisráðharrin nú loksins skrivaði valið út.

Orsøkirnar til valið eru fleiri og nakrar av teimum koma, so løgið tað ljóðar av, at tað búskaparliga gongur heilt óvanliga væl í Danmark. Hetta hevur elvt til eitt drúgvt og mangan ógvusligt orðaskifti og tvídrátt í samfelagnum um fordeilingspolitikkin. Hvussu skal ríkidømið býtast. Við øðrum orðum er vælferðin, sum fyri bert fáum árum síðan var eitt fý-orð hjá teimum borgarligu vorðin eitt hot evni. Nú yvirbjóða allir flokkar hvønn annan við vælferðartilboðum til barnafmiljur, gomul og ung. Men eisini onnur evni eru heit í hesum høpi sum t.d. almenni sektorin, sum er niðurpíndur, globaliseringin, krígsluttøkan, ES, innflytararmálið og ikki um at tala skattapolitikkurin. Tað er í skrivandi stund ógjørligt at meta um úrslitið, men okkurt bendir á, at sama stjórninn heldur fram.

Hvussu ávirkar valið so føroyskan politikk? Fyrst og fremst er valið eitt einastandandi høvi at fáa eina álítanadi mynd av løgtingsvalinum í janaur 2008. Hetta er ivaleyst besta Gallupkanning, ein kann hugsa sær. Flokkarnir fara tí ivaleyst at leggja óvanliga nógva orku í at vinna fólkatingsvalið. Hetta fer uttan iva eisini at ávirka útlitini fyri einum løgtingsvali í ótíð. Flokkarnir megna valla at skipa fyri tveimum valstríðum her og nú, so løgtingsvalið verður helst útskrivað eftir vallógini, og tað skuldi so verið tann 8. desember. Tá fer valstríðið í gongd av álvara og alt tingarbeiði verður niðurlagt. Støðan er áhugaverd, tí fólkatingsvalið verður eitt slag av generalframførslu til løgtingsvalið. Vit fáa at síggja, hvørji valevni, ið verða førd fram og vit fáa at síggja, hvørji mál flokkarnir leggja doyin á – samanumtikið ein áhugaverd venjing, tó at tað er sera óheppið at fáa eitt fólkatingsval, áðrenn eitt løgtingsval. Tað ætti at verið øvugt, tí tað er løgtingið, sum er okkara tjóðarting og ikki danska fólkatingið. Meira um hetta í fríggjadagsblaðnum.

**Sosialurin**

## At vera ella ikki at vera...politikari

**TÓRIR MIKKELSEN**
thormikkelsen@hotmail.com

Ja, so var aftur valár, og hóast eg bert eri tjúgu ára gamal, ja so eri eg longu troyttur av hesum møsninum.

Ein keypir bløðini av og á, og undrast yvir hví bløðini geva pláss. Pláss fyri politikarum, ið allir koyra í tómgongd, stríðast fyri at sleppa at sita 4 ár aftrat í teimum bleytu, fjálgu stólunum. Eg spyrji meg sjálvan aftur og aftur, hvønn tosa teir til?

Hetta er meinlíkt einum útbrendum og troyttum sjónleikara, ið framførir einataluna hjá Hamlet:" At vera ella ikki at vera... politikari", fyri tómum leikhúsi.

Ein hyggur eftir tingvarpinum og sær tingmenn halda langar og álvarsamar einatalur, fyri einum tómum sali. Eg hugsi mær til, at hann tosar til mín, til hyggjaran. Eg krevji undirhald, far á gyklaraskúla og lær nøkur triks, innihaldsliga er tað, tann vanliga suppan. Ein suppa, samansett av lokalpolitiskari fávitsku og býttleika, sum heild.

Tann politiski veruleikin í dag er sjúkur, visjónleysur. Ja bori tit bara enn eina tunnil, meðan skúlaverkið, heilsuverkið og øll hini mongu verkini falla í órøkt.

Eg haldi at sjúkueyðkennini eru mong, men at miðflokkurin eksisterar, man vera eitt hitt bersýntasta sjúkueyðkennið.

Tað er væl skiljandi at miðflokkurin fær veljarar, tá ið hinir flokkarnir ikki taka støðu. Stinga eina leið út í kortið og fylgja hana.

Fyri nøkrum vikum síðani, sendi eg eitt lesarabræv inn, ið varð mett, at vera ov ónæruligt, yvir fyri m.a. klaksvíkingum, keldufólki og øðrum religiøsum fanatikarum. Hetta sjálvt um eg var villigur til at leggja navn rygg til. Trongdskygd "hampafólk" í samkomur, sum eru útbúgvin í bíbliu (takk fyri Teitur).

Hvar fór tann stuttligi flokkurin? Har vóru hóast alt nakrir, ið dugdu at sýggja tað tragikomiska Cirkus Tinganes.

Hetta er ein innilig áheitan á veljarar í Føroyum, um for guds skyld ikki at velja Miðflokkin.

## Almenn áheitan frá Ættleiðingarfelagnum til landsstýrismannin

Ættleiðingarfelagið hevur í samskifti við landsstýrismannin heitt á hann um at arbeiða fyri at hækka stuðulin til ættleiðing og heitir nú alment á landsstýrismannin um at leggja fram lógaruppskot um, at stuðulin til ættleiðing hækkar.

Ein stórur vansi og forðing við altjóða ættleiðing er tann tunga fíggjarliga byrðan. Tann fíggjarliga byrðan er økt munandi tey seinastu árini og er tað ómøguligt at gjøgnumføra eina altjóða ættleiðing fyri minni enn  100.000 krónur í beinleiðis kostnaði. Tað eru dømir um einstakar ættleiðingar tilgongdir, har kostnaðurin hevur verið nærum tað tvífalda.

Undir verandi lóggávu er møguligt at fáa 50.000 krónur í stuðul til ættleiðing. Peningurin verður játtaður av fíggjarlógini sambært løgtingslóg nr. 51 frá 3 mai 1994 um ættleiðingarstuðul.

Talan er um smáar upphæddir. Síðani 2003 hava millum 7 og 11 foreldur fingið stuðul og tað mesta almennu Føroyar hava latið í stuðul til ættleiðing var í 2005, tá 550.000 vóru latnar. Ein lítil upphædd í mun til tann ómetaliga stóra týdningin hetta hevur, bæði fyri familju og samfelag.

Tað er ymiskt, hvussu fólk eru fyri fíggjarliga. Hjá summum ber til at fíggja ættleiðing yvir raksturin ella uppsparing, onnur fáa hjálp frá familju og fleiri mugu seta sítt álit á góðar bankar.

Verður játtanin ikki hækkað, kann tað koma hartil, at tey sum eru veikast fyri fíggjarliga og ikki kunnu útvega sær fíggjarligan stuðul, ikki fáa møguleikan at ættleiða.

Verður hesin møguleikin at gerast foreldur tikin frá teimum sum eru veikast fyri fíggjarliga í samfelagnum, verður ein nýggj samfelagsstatt skapt, sum ikki einans er veikast fyri fíggjarliga, men sum eisini vegna fíggjarlig kor er dømd at liva uttan børn. Hetta hevur tað góða vælferðarsamfelagið ikki ráð til.

Ættleiðingarfelagið hevur tí heitt á landsstýrismannin um at leggja fram uppskot um at hækka upphæddina í áðurnevndu lóg við 50.000 krónum og harvið tryggja øllum betri møguleika at ættleiða.

**Ættleiðingarfelagið**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.